# Blokkurin kann minka so hvørt inntøkurnar hækka

**- Ríkisveitingin úr Danmark skal ikki regulerast eftir fiskaprísum, ella eftir øðrum mátistokki, sigur løgmaður**

RÍKISVEITING
*Áki Bertholdsen*
*Aki@sosialurin.fo*

- Tað hevði verið eitt veldugt afturstig!

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, er hart ímóti uppskotinum um at danska ríkisveitingin til Føroya, skal regulerast eftir, hvussu fiskaprísurin á heimsmarknaðinum eru.

Hetta var annars eitt uppskot, sum er reist í kjalarvørrinum á ráðstevnuni, sum Norðuratlantsbólkurin í fólkatinginum skipaði fyri í Danmark.

Jóannes Eidesgaard sigur, at hendir tað, fer tað at elva til ein passivan og líkasælan búskaparpolitikk í Føroyum og tað er hann ikki sinnaður at vera við til.

– Tað fer at føra við sær, at tað krøvini til ein føroyskan búskaparpolitikk fara at linka, tí so vita vit, at gongur tað ikki, so fáa vit bara meiri blokk.

– Tað hevði verið eitt veldugt afturstig fyri okkara fíggjarliga sjálvræði og fyri royndirnar at skipa ein sjálvberandi búskap.

Hann heldur tvørturímóti, at føroyingar eiga at føra ein virknan politikk, har endamálið er at mótvirka teimum sveiggjum, sum eru í einum búskapi, sum okkara, sum er so viðbrekin, alt eftir, hvussu tað gongst í fiskivinnuni.

Júst hetta metir hann eisini sum eina avgjørda fortreyt í royndunum at menna ein sjálvberandi búskap.

– Skal blokkurin regulerast upp og niður, fer tað eisini at skerja okkara búskaparliga frælsi munandi, tí tá vera tað politikarar úr einum øðrum landi, sum koma at gera av, hvussu stórur, blokkurin skal vera.

### Kann minkast so hvørt

Jóannes Eidesgaard sigur, at endamálið við ríkisveitingini, er at varðveita áleið sama livistøði í Føroyum, sum í Danmark.

– Og verður avleiðingin, at vit noyðast at skerja okkara vælferðartænastur, góðtaka vit ikki, at blokkurin verður skerdur.

- Hinvegin vita vit, at nú hækkar blokkurin ikki aftur, tí nú gongur hann bara ein veg og tað er niðureftir.

Men løgmaður er ikki samdur í at blokkurin skal óloysiliga tengjast at teimum ymsu málsøkini, so at hann av sær sjálvum minkar, tá ið málsøki verða yvirtikin.

Hinvegin heldur hann, at tað, sum honum dámar best, er, at blokkurin verður minkaður, so hvørt føroyska samfelagið staðfestir eina inntøkuhækking.

– Tá fer ein niðurskurður í blokkinum ikki at merkja, at tað eisini verður neyðugt at skerja vælferðartænasturnar.

Hann sigur, at tað er eisini hendan hugsjónin, sum liggur aftanfyri undirgrundaravtaluna, har tað stendur, at finna føroyingar olju, skulu samráðingar verða um blokkin.

Hann hevur tó onki boð uppá, hvussu ein slík skipan skal gerast, har blokkurin minkar, alt eftir, hvussu inntøkurnar hjá samfelagnum hækka.

– Og her má talan verða um inntøkur, sum kunnu standa ímóti, tá ið fiskivinnan svíkur av teimum sveiggjum, sum altíð eru í henni.

– Men hann ávarar ímóti, at vara so ógvuliga til verka, sum undanfarna landsstýrið gjørdi, tí tíðirnar skifta og tær blivu altso ikki við at vera so góðar, sum tær hava verið seinastu árini.

– Tí er tað ein sera long tilgongd, at minka blokkin.

Og nakað áramál vil hann ikki seta á.

– Tey, sum seta áramál á og tey, sum halda, at blokkurin er skaðiligur, mugu eisini gera greitt, at so mugu vit eisini skerja vælferðartænastur.

Løgmaður leggur dent á, at hetta er hansara egnu sjónarmið, tí uppleggið hjá samgonguni til tær komandu samráðingarnar, sum verða næsta ár, ella í 2006, er ikki gjørt enn.



*– Ætlanin hjá Høgna Hoydal var heilt genial, sigur løgmaður*

### Genialt

Annars heldur hann, at ráðstevnan hjá norðuratlantsbólkinum í fólkatinginum at hava eina ráðstevnu í Danmark um búskapin í ríkinum, var ein heilt genialur leikur hjá Høgna Hoydal.

– Tá ið hann ikki megnar at fáa føroyingar at taka undir við sær, flytir hann føroyskan búskaparpolitikk til Danmarkar í eini roynd at fáa danskar politikarar at taka undir við sær.

– Tað heldur Løgmaður er undarligt, tí føroyskur fíggjarpolitikkur skal førast í Føroyum. Tað, sum Høgni Hoydal hevur gjørt, er ikki at ganga ímóti fólkaræðinum í Føroyum og tað má stórt spurnartekin setast við, sigur Jóannes Eidesgaard.

Annars væntar løgmaður, at politiska skipanin í Danmark er sterkari enn so, enn at hon letur seg taka av fótum av hesum.

# Búskaparliga frælsi má ikki takast frá okkum

**Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, fer nú at tosa við danska fíggjarmálaráðharran um ríkisveitingina til Føroya**

RÍKISVEITINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Eg trúgvi onki uppá, at danskir politikarar einvíst fara at lækka ríkisveiting-ina til, Føroya av hesum her, sigur Bárður Nielsen*

– Tá ið ovastu embætismenn í føroyum siga sína meining um ríkisveitingina, er tað sjálvsagt, at danskir politikarar lurtað.

Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, ivast ikki, at tað hevur sett síni spor í donskum politikki, at Hermann Oskarsson, formaður í búskaparráðnum, er av teirri áskoðan, at dabnska ríkisveitingin til Føroya hevur skaðilig árin á føroyska búskapin.

Men hann er kortini fullvísur í, at danskir politikarar hava ikki lurtað so væl, at teir fara at lækka blokkin.

– Eg trúgvi onki uppá, at danskir politikarar einvíst fara at lækka ríkisveitingina til, Føroya av hesum her, sigur Bárður Nielsen.

– Danskir politikarar hava eisini sína áskoðan á blokkin og teir fara ikki at skerja hann einvíst.

Eg vænti, at danskir politikarar taka eina langtíðarmeting av blokkinum, har teir ásanna, at summi ár gongur verri og onnur ár gongur frægari.

Og í løtuni heldur Bárður Nielsen í øllum førum, at ongin vandi er fyri blokkinum.

– Ríkisveitingin skal tryggja, at livistøðið í Føroyum er áleið tað sama, sum livistøðið í Danmark. Í løtuni er livistøðið í Føroyum eitt sindur lægri enn tað danska og skulu vit varðveita tær vælferðartænastur, vit hava, verður tað eisini neyðugt at varðveita blokkin, sigur hann.

Men fyri at tryggja sær, at danskir politikarar eisini kenna støðuna hjá landsstýrinum, fer Bárður Nielsen í næstum at tosa við danska fíggjarmálaráðharran um blokkin.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum í gjár, skal Bárður Nielsen hava fund við danska starvsbróður sín um rentuna av lánunum hja føroyingum í danska statskassanum.

Men nú fundur er avtalaður kortini, fer Bárður Nielsen eisini at taka spurningin um ríkisveitingina upp við danska topp politikaran.

Og støðan hjá føroyska landsstýrinum er, at verður blokkurin skerdur, fer tað samstundis at merkja, at tað verður neyðugt at skerja onkrar vælferðartænastur í Føroyum og tað væntar hann heldur ikki, at danskir politikarar eru sinnaðir til.

### Ketan leyp av

Eitt er, at Bárður Nielsen ikki er samdur í, at blokkurin skaðar føroyskan búskap.

Men ketan hjá landsstýrismanninum leyp heilt av, tá ið hann hoyrdi tað sjónarmiðið, at blokkurin skal regulerast eftir fiskaprísinum.

– Eg kann slett ikki taka undir við, at blokkurin skal regulerast eftir fiskaprísinum, ella eftir onkrum øðrum mátistokki, so at hann hækkar ella lækkar, at eftir um tíðirnar eru vánaligar ella góðar.

– Tað fer at taka tað fíggjarliga frælsi og tað fíggj-arligu ábyrgdina frá okkum. Hendir tað, verða tað onnur, sum fult og heilt áseta blokkin og tað taki eg ikki undir við. Og so verða tað samstundis onnur, sum fara at áseta, hvussu tíðirnar í Føroyum skulu vera og, hvørjar vælferðartænastur, vit skulu hava.

– Samstundis er stórur vandi fyri, at tað hevði elvt til ein ábyrgdarleysan føroyskan fíggjarpolitikk.

– Tá verður ábyrgdin fyri einum føstum og skilagóðum fíggjarpolitikki partvís tikin frá okkum, tí tá vit politikarar, at gongur tað illa, ger tað ikki so nógv, tí so hækkar blokkurin bara.

Annars ivast hann ikki í, at allir flokkar í Føroyum eru sinnaðir at føra ein fíggjarpolitikk, sum ber fram ímóti sjálvbjargni.

– Men treytin hjá okkum er, at vit skulu varðveita tað vælferðarstøðið, vit hava. Onkur flokkur er sinnaður at skerja blokkin, hóast tað kostar vælferðartænastur, men tað eru vit grundleggjandi ósamd í.

Tá dámar Bárði Nielsen nógv betri skipanina, sum er, har blokkurin er ein føst upphædd.

– So hava føroyskir politikarar tað at halda seg til og so mugu teir húsast við tí, sum er, sigur hann

### Varðveita blokkin

Nú skulu samráðingar aftur verða um blokkin, men Bárður Nielsen sigur, at landsstýrið hevur enn ikki tosað um, hvussu tað føroyska uppleggið til tær samráðingarnar skal vera.

Men hann væntar kortini, at uppleggið fer at vera, at blokkurin skal vera á leið sama støði sum hann er nú.

Tað er ongin, sum tosar um at lækka blokkin. Hinvegin er tað heldur ongin, sum tosar um at hækka blokkin aftur.



# Vetrarklødd á summarútferð

**Sum altíð, tá ið gingið verður saman við ferðaleiðaranum, Høgna, tróta stuttligu søgurnar ikki, og tær nýtist ikki at keða teg á útferðum, har Høgni er við – heldur ikki, tá ið líkindini einki eru at reypa av**

ÚTFERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Høgni, sum er ferðaleiðari, rættir stavin upp og peikar*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tað sá einki serligt út til veður, tá ið vit fóru úr Havn stutt eftir middagsleitið seinasta leygardag. Mjørkin lá tættur oman millum húsanna, væta dreiv undan honum, og eitt frískt lágættarlot lá heim ígjøgnum Nólsoyarfjørð.

Stívan hálvan tíma eftir, at vit vóru komin út úr resinum úr Havnini, stóðu vit á Hotel Vágum og skiftu orð við ferðaleiðaran, Høgna, sum hendan dagin skuldi fylgja okkum á Bøstalafoss.

Líkindini í Vágunum hendan seinnapartin vóru ikki stórt øðrvísi enn í høvuðsstaðnum. Kanska lá mjørkin ikki so langt oman, og kanska var hann heldur turrari í veðrinum.

Kortini ivaðist ferðaleiðarin, um vit skuldu fara túrin, sum ætlaður var, ella um vit heldur skuldu fara at hyggja at onkrum í bygdunum.

Avgerðin fall kortini á Bøstalafoss, og tá ið vit koyrdu móti Vatnsoyrum, sást, at vegurin var rættiliga tornaður. Mjørkin lá tó enn langt oman. Ein ávísur glotti var at hóma omaná luftini, men ongantíð klárnaði heilt, so sólin kundi dagað undan.

Vit koyrdu niðan um bygdina á vesturarminum á Miðvági. Har fóru vit úr bussinum – øll meira ella minni vetrarklødd og settu kós eftir gøtuni vestureftir. Eini 30 fólk í ferðalagnum.

Ferðaleiðarin helt fyri, tá ið vit høvdu gingið eina løtu, at nógv var ikki at siga frá á hesum leiðum, men onkra søgu risti hann kortini úr skjúrtuermuni soleiðis av og á.

Á ferðini vestureftir sóu vit omanyvir Sørvágsvatn, sum Mikkjal á Ryggi í sínari tíð gav navnið, Leitisvatn.

Sum altíð, tá ið gingið verður saman við Høgna, tróta stuttligu søgurnar ikki, og tí nýtist tær ikki at keða teg á útferðum, har Høgni er við.

Frískligt var í veðrinum, men hagin var hampiliga turrur. Okkurt gil var eitt sindur váttligt, og onkur mundi fáa uppí skógvarnar, tá ið lopið var tvørtur um vátlendið.

Fríska lotið gjørdi, at tað kendist eitt sindur kalt í veðrinum, men tað bilti ikki, soleingi ferð var á.

Á gongutúrinum vestureftir var stuttur vegur niðan á eggina, har steyrrætt berg er niðurfyri, og tú sært niðan á Trælanípuna.

Komin vestur á Bøstalafoss, settust vit at eta matpakkan, og tá ið ferðalagið var samlað á klettunum eystanfyri omanrenningina, segði Høgni frá fleiri søgum um neytakonur, sum høvdu verið fyri ymiskum hendingum í haganum.

Tann eina konan var vorðin so sperd av einum manni, sum var eftir henni, at hon leyp út av og lendi í eini túgvu, sum ber navn eftir neytakonuni.

Meðan vit sótu við fótin á Sørvágsvatni, var rættiliga illfýsið og kalt. Tí var gott at sleppa at ganga aftur, og á ferðini heimaftur gingu vit fram við vatninum.

Her komu vit í hugnaligt prát við Suna Jacobsen, lærara og fyrrverandi skipaeigara og politikara, sum eisini var við í ferðalagnum hendan dagin.

Suni visti nógv at siga frá, og áhugavert var at hoyra, hvussu stóran áhuga hann og aðrir høvdu fyri skiparakstri tey 12 árini, teir áttu skip har vesturi.

Á vegnum heimaftur forbarmaðu nøkur, sum vóru við í ferðalagnum, seg um eina moyrreyða ær. Júðurið á ærini, sum helst hevði mist sítt lamb, hekk næstan niður á vøllin, soleiðis at hon illa fekk gingið.

Tey vildu hava Høgna, sum annars er røktingarmaður, at hyggja at ærini ella boða teimum frá, sum hava við hendan hagan at gera. Høgni gekk niðan móti ærini, men hon gekk undan. Væntandi tóku teir, sum varða av haganum, sær av hesum neyðars seyði, sum ikki sá út til at hava tað gott.

Sørvágsvatn er stórt. Ferðaleiðarin nevndi, at tað er umleið hálvan fimta kilometur langt. So, tað tók sína tíð at ganga heimaftur til bussin, sum bíðaði eftir okkum á vegnum millum Vatnsoyrar og Sørvág.

Líkindini vóru einki serlig til slíka útferð, men øll, sum við vóru, tóktust fegin um, at tey kortini vóru farin hendan túrin.

Seinni um kvøldið var gott kalt borð á Hotel Vágum við undirhaldi, sum Elsa Annika stóð fyri. Tá ið vælsmakkandi maturin aftur við onkrum leskandi varð fingin niður um, skipaðu Kim Hansen og James Olsen saman við øðrum fyri góðum dansitónleiki.



*Tað er stuttligt at vera á útferð við Høgna. Tær nýtist ikki at keða teg, hóast toka og illfýsið er*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Tey sita og skaffa og kroka. Illfýsið er, men lagið er gott*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Jan Muller, blaðstjóri og Edvard Joensen, sum leiðir redaktiónina í Vágunum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Tað er gott at fáa ein bita, áðrenn farið verður at ganga heimaftur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*